H71

faldari 8

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

H71 - KYNDIL

Mikudagin 9. apríl kl. 19.30

Hoyvíkshøllin

BONUS
J&K
FØROYATELE
SUÐUROYAR SPARIKASSI
Advokatfelagið
Yviri við Strond
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari
bilrokt.fo
P/F THOMAS DAM
ITRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgota 5 · Tel. 31 14 03
polytan

PENSJÓN

BETRI AT HAVA
GOTT Í VÆNTU

1. januar 2014 kemur nýggja pensjónslógin í gildi. Hetta merkir at tað er lógarkrav, at allir føroyskir løntakarar gjalda til egna pensjón.

Við Betri pensjón hevur tú fult gjøgnumskygni. Tú sært, hvussu nógv tú sparir saman til eftirløn, hvussu nógv fer til tryggingar, og hvussu nógv verður goldið fyri umsiting.

Harafturat kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri, um tú samlar tínar tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum og tína pensjón hjá Betri pensjón.

Set teg í samband við ein av okkara ráðgevum á tel 345 700 ella betri@betri.fo, so vit saman kunnu gjøgnumganga tíni tryggingar- og pensjónsviðurskifti.

betri.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón

HANN ER LIÐUGUR ... NÆSTAN!

Mynd: Fríðbjartur Miðberg

UNGDÓMSÁRIÐ ER AV, MEDALJUR OG ANNAÐ HANDAÐ, SO NÚ ER AT FYRIREIKA SEG TIL NÆSTA ÁR, SUM VIT BÍÐA EFTIR, AT TEY SEINASTU ÚRSLITINI FRÁ BESTUDEILDINI RULLA INN. EITT ER AT SÍGGJA, HVUSSU LIÐ OG EINSTAKLINGAR MENNAST Í HVØRJUM, MEN LÍKA SO HUGALIGT ER AT VITNA ØKT SAMANHALD INNAN OG TVØRTURUM ALDURSBÓLKAR. SERLIGA Í HOYVÍK.

Eftir: Agga Niclasen

Í skrivandi løtu hava vit fingið 4 út av 9 meistaraheitum í ungdómspartinum, men hava møguleika fyri tí fimta, um annars yngstu genturnar hjá okkum avgreiða sín setning í Kollafirði. Ja, í Kollafirði, hóast mótstøðuliðið er VÍF. Vit tosa uttanveltaðan leikvøll við uttanveltaðum dómarum. Í gentur 10. Ikki eiti á.

Sirkulsitandi sosialpedagogar korsa seg óivað, meðan vitonnur hgusa „FEITT“. Uttan kapping tekur tú líkasum nervan úr spælinum. Vissuliga, menning og dirvi at skifta út og spæla leikarar á óvandum plássi í óvandum formatiónum, er super, og skal eisini praktiserast!, men kapping skal til.

Aðramáta kunnu tit gott eiga hasa ítróttargreinina fyri mín part. Eg tími so ikki at koyra

úr Havnini, allanvegin til Eiðis, niðanígjøgnum bygdina og gena í tríggjar tímar uttan nakað veruligt er upp á spæl.

So heldur ganga mær ein túr oman eftir Jónas Broncks gøtu eftir rundstykkjum, tendra internet-transistaran. Forrestin, tólv rundstykki átti at verið nokk, men vegna minimalum substansi er nú neyðugt við fýraogtjúgu av slagnum. Men so er gongdin: størri skúlar og mektigari barnagarðar mest líkir ovurindustrialiseraðum flakavirkjum heldur enn faktiskt innihald. Eisini bloody morgunbreyð.

Hondbólturin ger eisini, at børn í tí stóra heila ikki enda sum ovurfeit, hvat er ein væl frægari og ómannminkandi politikkur og íløga enn hasin mikrostýrandi sosialpolitikkurin hjá sjálvstøðugum umboðsstovni, settur á stovn og styðjaður av statinum. Heitið er „ráð", men eginliga funktiónin er mest av øllum stasikend.

Óansæð, eiheldur hatta fáa vit gjørt nakað so øgiliga nógv við. Eg veit bara eitt, og tað er, at tað er so evindaliga lætt hjá høga miðalklassanum at prædika fyri sínum betrivitandi fiti – og sukuravgjaldi og hægri alkoholprísum við eini mánaðarløn handan fjøruti pluss.

Men, og aftur til FM. Vinna vit í dag, hósdagur, so eiga vit meiri enn helmingin av meistaraheitunum. Og har vit ikki eru meistarir, ja, har eru vit á einum flottum øðrum – ella triðjaplássi. Og vinna vit a-bólkin, tá vinna vit eisini b-bólkin, ella enda við silvuri ella bronsu. Og har metall ikki røkkur, so ikki hesuferð, íðan, tá hava avrikini mangan verið ófør við nógvum góðum momentum at hóma. **Hetta er minst líka vigtugt.**

Hevði so okkara AA-lið eisini vunnið metall, ella endað on a high, tala vit tístðani um eitt óvanliga væleydnað ár.

Okkara heimasíða við altjóða formati er av sonnum komin ígongd, tó so at vit kundu hugsað okkum væl fleiri innlegg, myndir og annað tilfar. Og eisini settu vit hondbóltsmennara í starv, ongin minni enn navnframi Flemming Oliver Jensen.

Alt hetta borgar fyri eini bjartari framtíð, og eg gleðist sum eitt barn longu til næsta ár... hóast eitt sindur lúgvaður nú.

LEINGI LIVI H71!!!

Ítróttarfelagið Hoyvík H71
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

NEVND
Sunneva Jakobsen, formaður
sunneva@liv.fo, 231115

Gunn Ellefsen, næstformaður
ge@lawfirm.fo, 593040

Agga Niclasen, nevndarlimur
h71faldarin@gmail.com, 508689

Anna Dam, nevndarlimur
ad@lawfirm.fo, 519082

Hallur Danielsen, kassameistari
hallurdanielsen18@gmail.com, 239615

René Dahl Olesen, skrivari
renedo@faroeship.fo, 549010

SAMSKIPARI
Hallur Danielsen
hdanielsen@sbwcargo.com

HEIMASÍÐUUMSITARI
Carl Herup Høgnesen
carlherup@gmail.com

Anfinnur Hovgaard
anfinnur@gmail.com

Agga Niclasen
H71faldarin@gmail.com

FALDARAUMSITARI
Agga Niclasen
h71faldarin@gmail.com, 508689

SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705

MYNDIR
Jan Egil Kristiansen, 262240

ÚTGEVARI
H71

HVUSSU ROYNDIST KAPPINGARÁRIÐ HJÁ ATLANTIC AIRWAYS LIÐNUM

KAPPINGIN ER IKKI LIÐUG ENN, SO NAKAÐ AV ÓVISSU ER FRAMVEGIS UM HVAR VIT KOMA AT LIGGJA, TÁ ALLIR DYSTIR ERU LEIKTIR. KORTINI BER TIL AT LÍTA AFTUR Á HVUSSU KAPPINGARÁRIÐ SUM HEILD HEVUR HILNAST FYRI H71.

Eftir: Jan Sørensen

Ein máti at skipa eina samanbering er at hyggja eftir hvussu gekk ímóti hvørjum lið sær:

KÍF (H71: 2, 0, 2, ?)

Seinastu árini hava vit kappast við kollfirðingar um at vera besta hondbóltsliðið í Føroyum. Tí kundi verið hóskandi at byrja við teimum. Frá at verða eitt støðugt botnlið hevur KÍF mennt seg til nakað, vit kundu kalla ein maktfaktor í føroyskum hondbólti, eitt nýbrot, ið vendi øllum á høvdið. Lið sum traditionelt vóru sjálvskrivað sum favorittar eru viknað, og nýkomin lið sum H71 og KÍF hava myndað toppin seinastu árini. Hvussu gekk so í ár ?

Úrslit: H71-KÍF: 28-25, KÍF- H71: 27-23, H71-KÍF: 25-24, KÍF- H71:

Okkara millum er ikki avgjørt enn, vit mangla seinasta dystin í ár. Ilt er at meta um hvussu úrslitið verður. Fyri H71 er eitt møguligt bronsupláss at spæla um, fyri KÍF er bert æra eftir.

Fyrsti dysturin var heilt víst tann minniligasti, Bogdan var í stórformi. Hann skeyt heili 17 mál, ein einmansherur , ið boðaði frá góðum. Øll 17 málini vóru perlur. Men annars hevur leikað javnt á. Spennandi hevði verðið í eini finalu, hvør mundi fara at verða stinnastur.

VÍF (H71: 0, 0, 0, 0)

Í nógv tey seinastu árini hava vit havt takið á vestmenningum, men í ár hava vit tapt allar fýra dystirnar. VÍF hevur verið høvuðsatvoldin til, at vit ikki eru eitt av finaluliðunum. Minniligastur var tann fyrsti dysturin, har tað gekk so strúkandi ta fyrstu løtuna, vit førdu við nógvum málum, og taptu at enda snópisliga.

Úrslit: H71-VÍF: 26-27, H71- VÍF: 29-27, H71-VÍF: 23-27, H71- VÍF: 27-24

STÍF (H71: 2, 2, 0, 1)

Eftir fyrsta dystin skrivaði heimasíðan, at sjálvt um vit vunnu tepurt við einum máli, so varð mett at StÍF fór at verða eitt av liðunum, sum komu at gera seg galdandi í strembanini eftir at koma í finaluna. Eisini skrivaði heimasíðan, at tað sást, at okkara ungu leikarar vóru blivnir eitt ár eldri, tað var nakað meiri sjálvsikkurt yvir spælinum. Nakað sum seinni ikki var so sjónligt, sum tað sýntist ímóti strandingum.

Samanumtikið vóru vit betri enn StÍF í ár, vit vunnu tveir, javnaðu ein og taptu ein.

Úrslit: StÍF-H71: 29-30, H71- StÍF:31-29, StÍF-H71: 24-22, H71- StÍF:21-21

KYNDIL (H71: 0, 1, 0, ?)

Teir grønu hava verið dýrir í ár, higartil hava vit bert megnað at fingið eitt stig. Ikki tí at Kyndil hevur víst yvirmannastyrki, men heldur ein brennandi hug at vinna. Kyndlaverjan hevur eisini verið tættari í ár, og verri hevur verið at finna nakað stað, har garðurin hevur verið lægstur. Enn er ein dystur eftir og gott hevði verið at vunnið hendan síðsta dystin okkara millum í ár.

Úrslit: Kyndil-H71: 23-20, H71- Kyndil: 26-26, Kyndil-H71: 27-25, H71- Kyndil: ?

NEISTIN (H71: 0, 1, 2, 2)

Á pappírinum sýnast teir lættir at vinna á, men veruleikin hevur víst seg ein annar. Vit

byrjaðu við einum tapi. Als ikki ófortjent hjá Neistanum, tað eydnaðist bara væl hjá teimum bláu. Næsti dysturin endaði javnur, eftir gott og javnt spæl frá báðum pørtum, serliga málmennirnir vístu góðar dygdir. Í seinnu hálvu vóru teir bláu ikki eins spæliglaðir, sum teir vóru í fyrru helvt. Eftir dystin skrivaði H71-heimasíðan soleiðis um neistaliðið: „Sonn spæligleði" hjá Neistanum. Tað var sum høvdu teir vunnið FM fyri hvørt mál og hvørja bjarging. Heilt sermerkt fyri júst hetta „Neistaliðið". Í seinnu hálvu var hetta ikki heilt beinrakið, og vunnu vit lættliga báðar dystirnar eftir jól.

Úrslit: H71-Neistin: 25-29, Neistin-H71: 20-20, H71-Neistin: 31-23, Neistin-H71: 18-31

TEAM KLAKSVÍK (H71: 2, 2, 2, 2)

Hondbóltsliðið úr Klaksvík er í stórari menning. Líta vit bert 2-3 ár aftur í tíðina, og samanbera við liðið í dag, so sæst stórur munur. Liðið er blivið nógv betur, og kann ein góðan dag við hepni arga øll lið. Hetta vóru vit í H71 tey fyrstu at merkja, tá vit heilt óvantað taptu dyst í Klaksvík, sum tað fyrsta AA-liðið. Eyðkent fyri Team-Klaksvík hevur verið, at tað er bygt um ein til tveir markantar útlendingar, t.d. Filip Josic og Zarko Pejovic, sum nú báðir eru í VÍF. Har eru eisini aðrir profilar, strikan Dánjal Kjærbo og markanti høgri bakkurin, Sámal á Tjaldrafløtti, sum hevur eitt óvanliga gott skot.

Hóast stóra framgongd, so vóru tað 8 stig til H71 og null til Team Klaksvík, í fýra dystum sum allir meir ella minni líktust, javnir fyrru hálvleikir og onkuntíð eisini nakað út í annan hálvleik, men so tók at bila við orku og konsentratión hjá klaksvíkingunum, og til síðst bleiv tað hóast alt til ein greiðan sigur til H71.

Úrslit: Team Klaksvík-H71: 26-32, H71- Team Klaksvík: 30-25, Team Klaksvík-H71: 24-33, H71-Team Klaksvík: 33-27

Hvussu gekk so samanlagt gjøgnum alt árið.

Sum nevnt omanfyri, so sýntist, í byrjanini, sum at menn vóru blivnir hondbóltsvaksnir. Nakað sum helst fór at síggjast aftur í spælinum. Hetta kom tó ongantíð reiðiliga fram.

Tað var at líkna við ein fløga við líggjum veðri um várið, tá runnar og trød alt fyri eitt byrja at næla, fyri síðan brenna av í frosti og byrja umaftur, tá rætta summarlýðkan er komin.

Onkur runnur klárar seg betur enn væntað, meðan aðrir standa seg verri, soleiðis hevur eisini verið hjá H71.

Høvdu vit til næsta kappingarár borið so í bandi, at vit spíraðu til røttu tíð, vuksu við uppgávuni gjøgnum árið, og blómaðu sum nýggjar hoyvíksliljur næstu páskir, so kunnu vit vinna bæði steyp og gull.

HH = HOYVÍKSHØLLIN SvL = Skúlin við Løgmannabreyt

Kl.	Mánadag		Týsdag	Mikudag	Hósdag	Fríggjadag	
	HH	SvL	HH	HH	HH	HH	SvL
14.00						G12	
14.00						G12	
15.00	D12		D10	G12	D10	G14	
15.30	D12		D10	G12	D10	G14	
16.00	G12		G14	U8	G14	D16	
16.30	G12		G14	U8	G14	D16	
17.00	G10		G10		D12	D14	
17.30	G10	U6	G10		D12	D14	U8
18.00	AA	U6	AA		AA	D10	U8
18.30	AA		AA		AA	D10	G10
19.00	D16		AA		AA	D18	G10
19.30	D16		D12		D16	D18	
20.00	D14		D12	D14	D16	D18	
20.30	D14		G17	D14	G17		
21.00	D18		G17	D18	G17		
21.30	D18		G17	D18	G17		
22.00							
22.30							

Deildir	Viðmerkingar
AA	
D18	
D16	
D14	
D12	
D10	
G17	

Deildir	Viðmerkingar
G14	
G12	
G10	Venja eisini í fimleikahøllini í Skúlanum við Løgmannabreyt (SvL) fríggjadag kl. 18.30-19.30
U8	Venja eisini í fimleikahøllini í Skúlanum við Løgmannabreyt (SvL) fríggjadag kl. 17.30-18.30
U6	Venja í fimleikahøllini í Skúlanum við Løgmannabreyt (SvL) mánadag kl. 17.30-18.30

VENJARAYVIRLIT H71 KAPPINGARÁRIÐ 2013/2014

Deild	Heiti	Navn	Tlf	Teldupost
AA/1. deild	Høvuðsvenjari	Petur Mittún	218284	peturmittun@gmail.com
AA/1. deild	Hjálparvenjari	Halgir Dahl Olesen	549020	halgir@faroeship.fo
AA/1. deild	Kroppsligur venjari	Snorri Paturssón	222814	snorripatursson@hotmail.com
AA/1. deild	Liðleiðari	Lars Tornefeldt	266287	lars_tornefeldt@hotmail.com
AA/1. deild	Hjálpari	Rene Dahl Olesen	549010	renedo@faroeship.fo
D18	Høvuðsvenjari	Gunnar Djurhuus	507008	gunnardjurhuus@gmail.com
D18	Hjálparvenjari	Hallur Biskupstø	517606	hillar_1993@hotmail.com
D18	Hjálparvenjari	Janus Sørensen	264580	janussorensen88@mail.com
D16	Høvuðsvenjari	Birgir Poulsen	593011	bpo@eik.fo
D16	Hjálparvenjari	Rúni Højgaard	261415	runi_hoyvik@hotmail.com
D16	Hjálparvenjari	Bogdan Florea	581569	simoni_k_96@yahoo.com
D14	Høvuðsvenjari	Halgir Dahl Olesen	549010	halgir@faroeship.fo
D14	Hjálparvenjari	Bogi Davidsen	276704	bd0206u7@skulin.fo
D14	Hjálparvenjari	Jónas Djurhuus	506996	jonash71@gmail.com
D12	Høvuðsvenjari	Petur Mittún	218284	peturmittun@gmail.com
D12	Hjálparvenjari	Karl Oddmar Rasmussen	508338	karlor@live.dk
D12	Hjálparvenjari	Rói Joensen	555172	roi.joensen@gmail.com
D12	Hjálparvenjari	Gilli Wardum	220505	gilli.wardum@gmail.com
D10	Høvuðsvenjari	Jens á Skipagøtu	280325	jens.a.skipagotu@skulin.fo
D10	Hjálparvenjari	Rúni Højgaard	261415	runi_hoyvik@hotmail.com
D10	Hjálparvenjari	Hanus Norðberg	519856	hanusn@yahoo.com
D10	Hjálparvenjari	Bogdan Florea	581569	simoni_k_96@yahoo.com
G17	Høvuðsvenjari	Petur Martin Johansen	296260	fc.torshavn@mekonomen.fo
G14	Høvuðsvenjari			
G14	Hjálpari	Hallur Danielsen	504144	hallurd@olivant.fo
G14	Hjálpari	Rene Dahl Olesen	549010	renedo@faroeship.fo
G12	Høvuðsvenjari			
G12	Hjálparvenjari	Eindri Frýdal	274804	eindri94@hotmail.com
G12	Hjálpari	Jákup Símun Simonsen	214154	as@spekt.fo
G12	Hjálpari	Annfinn Simonsen	233474	as@spekt.fo
G10	Høvuðsvenjari	Hendrik Egholm	237410	hendrik@magn.fo
G10	Hjálparvenjari	Tróndur Joensen	272628	thoensen@hotmail.com
G10	Hjálparvenjari	Jákup Sverri Kass	212500	js_kass@hotmail.com
D8	Høvuðsvenjari	Djóni Højgaard	592173	djonsawow@hotmail.com
D8	Hjálparvenjari	Oddur Bech	255625	
G8	Høvuðsvenjari	Hallur Danielsen	504144	hallurd@olivant.fo
G8	Hjálpari	Sámal Paulason	223453	tsh@kallnet.fo
G8	Hjálpari	Silja Sámalsdóttir	521968	
G8	Hjálpari	Maria H. Weyhe	271036	
U6	Høvuðsvenjari	Beinta Ejdesgaard	226620	beinaej@hotmail.com
Ungdóms	Málmansvenjari	Ari Egason Dam	512090	aed@eik.fo
Ungdóms	Hjálpari	Hanus Kristiansen	239617	hakr@sbw.fo
Ungdóms	Hjálpari	Tóraldur Kollsker		

NÚ ER EITT ÁR FARIÐ

NÚ ER EITT ÁR FARIÐ, SÍÐANI NÝGGJA HEIMASÍÐAN HJÁ HONDSBÓLTS-FELAGNUIM Í HOYVÍK FÓR ÚT Í ALHEIMIN. 5. APRÍL 2013 VAR DAGURIN.

Eftir: Anfinnur Hovgaard

Áðrenn tað hevði H71 eina heimasíða, treyðugt so, men fólk hildu, at nú var tíðin komin til at fáa eitt nýtt snið – eitt nýtt andlit til H71. Og Jan Sørensen, sum hevði havt heimasíðuna um hendi, ynskti nú at fáa frí.

So nú skuldu nýggir bollar í suppuna.

Eitt er at deseina – ella sniðgeva – heimasíðuna, tí partinum tók Sendistovan og Heini Festirstein sær av saman við Halli og Agga frá H71.

At skriva innihaldið, tí partinum taka Agga Niclasen og Jan Sørensen sær í stóran mun av.

So er tað síðsti parturin – at fáa tilfarið lagt út.

Har var tað, at eg skuldi inn í myndina.

Agga ringdi at spyrja, um eg kundi taka mær av at leggja tilfar út á nýggju heimasíðuna.

Tá mann – sum eg – arbeiðir innan teldu-heimin/KT, so verður typiskt hildið, at „mann veit alt um hatta har. Ein telda er ein telda og soleiðis er tað allan vegin, ikki sannheit?"

Verunleikin er bara tann, at KT-økið er blivið ómetaliga stórt, og at mítt kjarnuøki er fíggjar-stýringsloysnir frá Formula. Onki við heimasíður at gera.

Men hvat, at leggja tilfar út á eina heimasíðu, tað er neyvan „rocket-science". So, tja, hví ikki. Játtaði meg til uppgávuna.

Mína gongd í felagnum byrjaði, tá yngsta dótturin for at spæla hondbólt fyri nøkrum árum síðani. Fyri at geva gentunum eitt sindur av moralskum stuðli (og fortjentum rósi og rísii!)), so hevði eg skrivað nøkur innsløg til heimasíðina. Og so hevur mann kanska onkuntíð brúkt seg eitt sindur og komin við onkrum hugskoti.

Men tað var í lagi. Og tað er tað enn.

Uppgávan hevur kanska verið eitt sindur størri og tíðarkrevjandi, enn eg hevði væntað. Men tað er í mest orsakað av, at har var ymiskt nýtt at seta seg inn í. Tíð er farin til at gera ymsar royndir, at kanna og lesa seg fram til loysnina.

At leggja eina grein út í dag í mun til tá . tað er nokk ein faktor 1-5.

Eitt er at taka móti tilfari og at leggja tað út. Vanligur tekstur er ikki tað stóra, men venjingartalvur og líknandi kann taka tímar at fáa liðugt.

Tann stóra avbjóðingin er heldur at finna generellar myndir, tekningar og grafikk. Ein grein kann ikki verða løgd á heimasíðuna uttan eina rímuliga hóskandi mynd. Og tí at er tað eitt krav, at uttan mynd kemur ongin grein út. Má siga tað, at internetið er í nærum ótømandi kelda til hetta endamálið, ao tað er mangan komið væl við. Vónandi eru alt ov nógv upphavsrættindi ikki blivin brotin.

Tá tað snýr seg um dystarmyndir, so er Jan Sørensen óførur. Men vit hava eisini fingið loyvi at brúka myndir frá Álvi Haraldsen, Jóanis Nielsen og Jens Kristian Vang. Takk fái tit fyri tað :)

H71.fo er nokk ikki tann heimasíðan, sum er fyrst við tí nýggjasta, heldur ikki innan hondbóltin. Onnur eru vanliga nógv skjótari at leggja tilfar á til dømis fjesbókina. Og tað er eisini í lagi. Nógv teirra, sum eru á FB, er ofta mest sum altíð online. Og so er tað ein øðrvísi uppgáva at leggja tilfar á FB í mun til heimasíðuna.

Tøknin í dag – statt ikki fyri! Menningin hevur verið øðilig seinastu 5 árini. Bara gamla Casio-urið hjá mær hevur meira teldumegi, enn Apollo 11 og Eagle høvdu á sinni, tá 2 mans lendu á Mánanum.

Sum alt annað , so ber tað til at stýra heimasíðuna hjá H71 frá einari snildfon! Men í praksis ber tað faktiskt ikki til. Heimasíðuskipanin góðtekur ikki eina og hvørja stýrisskipan (Firefox er tað, sum vikar best her), og tað kunna vera nógvir parametrar at stilla – og tað ber altso ikki altíð so væl til á einum lítlum skermi. Og mús er næstan eitt „must" – uttan er tað sera tvørligt. So frægastað amboðið (enn) er ein góð telda.

Stóru tíðindaportalarnir eru ofta nokk so skjótir. Tá fótbólturin væl at merkja ikki fer við øllum kapasitetinum (so fekk eg hatta skotið sett inn ;).

Vit internetinum er heimurin lítil. Í summar var stórt ferðalið frá H71 í Göteborg í Svøríki, har árliga Partille Cup var á skránni. Eini 22.000 leikarar ialt.

Har var ongin trupulleiki at sita á einum kamari á 7. hædd á Gothia Towers og leggja tilfar út á heimasíðuna.

Tað ber til at fáa fleiri hagtøl úr heimasíðuskipanini.

Í skrivandi løtu hava vit havt meira enn 85.000 vitjandi, svarandi til eini 230 í meðal hvønn dag.

Havi tikið nøkur hagtøl út fyri alt hetta farna árið.

Flest vitjanir hava verið í tímunum millum klokkan 21 og 23, fleiri enn 11.000 ialt. Men eisini á náttartíð verður vitjað: millum klokkan 00 og 07 hava vit havt næstan 9.000 vitjanir ialt. Og eg sum so naivt trúði, at fólk høvdu annað at gera hasa tíðina á døgninum...

Mánadagurin er tann vikudagurin, sum hevur flest vitjandi, ialt 13.900.

Nú fer hetta hondbóltsárið at enda. Men tað merkir ikki, at heimasíðan fer í dvala. Eins og fleiri av liðunum hjá H71, so fara vit á heimasíðuni at halda dampin uppi gjøgnum summarið. Kanska vera ikki so nógv innsløg, tí í ár er H71 ikki við í Partille Cup.

Men munna vit ikki fara at frætta okkurt frá okkara nýggja U20-manslandsliði? Og lat okkum ikki gloyma tað upp aftur nýggjari U18-kvinnulandsliðið, sum skal til European Open í Göteborg í summar.

Tað verður í øllum førum sera spennandi.

Havi tað gott, øll somul :)

TEY SVØRTU TØLINI

DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í ATLANTIC AIRWAYS DEILDINI

Dato	Heimalið	Útilið	Úrslit
29.09.2013	StÍF	H71	29-30
09.10.2013	H71	Neistin	25-29
19.10.2013	Team Klaksvík	H71	26-32
23.10.2013	H71	VÍF	26-27
26.10.2013	Kyndil	H71	23-20
03.11.2013	H71	KÍF	28-25
10.11.2013	H71	StÍF	31-29
17.11.2013	Neistin	H71	20-20
01.12.2013	H71	T. Klaksvík	30-25
08.12.2013	VÍF	H71	29-27
15.12.2013	H71	Kyndil	26-26
21.12.2013	KÍF	H71	27-23
04.01.2014	StÍF	H71	24-22
12.01.2014	H71	Neistin	31-23
12.02.2014	Team Klaksvík	H71	24-33
19.02.2014	H71	VÍF	23-27
22.02.2014	Kyndil	H71	27-25
02.03.2014	H71	KÍF	25-24
09.03.2014	Neistin	H71	18-31
12.03.2014	H71	StÍF	21-21
23.03.2014	H71	T. Klaksvík	33-27
02.04.2014	VÍF	H71	27-24
06.04.2014	H71	Kyndil	
12.04.2014	KÍF	H71	

STØÐAN ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN

Nr.	Lið	Dystir	V.m	T.m.	Munur	Stig
1	VÍF	23	698	623	75	31
2	KÍF	22	637	566	71	29
3	StÍF	23	625	613	12	27
4	H71	22	586	557	29	23
5	Kyndil	22	592	576	16	23
6	Neistin	22	586	626	-40	17
7	T. Klaksvík	22	562	725	-163	6

LIÐINI HESUFERÐ

H71

Málmenn:

1 Ári Egason Dam
12 Tóraldur Kollsker
21 Hanus Kristiansen

Útileikarar:

4 Rúni West Højgaard
14 Sigmundur Dahl
5 Bogi Gaard Davidsen
17 Hallur Biskupstø
13 Bogdan Florea
6 Tróndur Arge
7 Esbern Patursson
10 Birgir Poulsen
15 Sigmundur Nolsø
6 Hans Kári Hansen
18 Andor Sivertsen
21 Pætur Thomsen
8 Jónas Gunnarsson Djurhuus
3 Høgni Olafsson

Høvuðsvenjari: **Petur Mittún**

Venjari: **Halgir Dahl Olesen**

Málmansvenjari: **Hákun Djurhuus**

Liðleiðarar: **Andrass Marr Poulsen, Lars Tornefelt og René Dahl Olesen**

Kyndil

Málmenn:

Jan Pauli Johannesen
Mladen Mjerimacka

Útileikarar:

David Edvardsen
Hørður Fannar Sigthórsson
Finnur Hansson
Oyvind Lützen
Høgni Klein Olsen
Tróndur Jensen
Hjalti Backmann
Josef Abrahamsen
Bárður Johannesen
Høgni Klein Olsen
Hans Arni Thomsen
Ken Zachariasen
Bjarni Sørensen

Venjari: **Hjalmar Klein Olsen**

Liðleiðarar: **Finnur Hansson Geir Wardum**